# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# SLEPPUR IKKI AT STÝRA PRESSUNI

Formaður Tjóðveldisins hevur tikið sær tykni av, at vit í oddagrein í síðstu viku vístu á, at misálitis-uppskotið frá andstøðuni var hálvhjartað. Skoðsmálið fekk andstøðan, tí tvær atkvøður hjá andstøðuni restaðu í, tá atkvøtt varð í tinginum um hetta álvarsmál skírisaftan. Tveir andstøðuting-menn møttu ikki til arbeiðis, og tað er ikki júst tað, sum eyðkennir gott politiskt handverk og er valla serliga seriøst heldur.

Tað var bara hetta, sum odda-greinin snúði seg um, og vit kunnu endurtaka, at um andstøðan vildi hava, at misálitið skuldi verða sam-tykt, so var tað minsta kravið, at allir uppskotsstillararnir møttu til arbeiðis.

Men afturfyri fer Høgni Hoydal ikki við mýkindum við Sosialinum. Høgna Hoydal kunnugt hevur Miðlahúsið fleiri miðlar, Sosialin, Rás2 og www.portal.fo hjá Føroya Tele. Høgni Hoydal veit eisini væl, at vit gera nógv við politikkin á Rás2, har hann sjálvur javnan kemur á gátt. Løgtingsfundir verða vanliga hildnir eftir at bløðini eru farin til prentingar, tí fáast bara í besta lagi daggomul tíðindi haðani.

Formaður Tjóðveldisins er sjálvandi vælkomin at hava sínar hugsanir um okkum, sum starvast í Miðlahúsinum. Hann hevur skotið við skørpum áður. Men tað er kortini ikki sørt ófrættakent, tá ein topppolitikari leikar so í og vil stýra pressuni. Hetta leiðir tankar okkara tíggju ár aftur í tíðina, tá hann sum varaløgmaður í fleiri tímar legði stórt trýst á blaðleiðsluna á Sosialinum um at fáa steðgað dagsins útgávu av blaðnum - sum hevði eina forsíðusøgu, ið ikki hóvaði honum. Hetta fær okkum eisini at hugsa eitt tíðindaskriv, sum varð sent upp á nakkan á einum øðrum landsstýrismanni, sum tískil varð avdúkaður sum lygnari.

Vit hava okkara lastir, eins og Høgni Hoydal hevur sínar lastir. Ein last hansara er, at hann klárar ikki sjálvur eina kritiska pressu, sum hann eftirlýsir. Tann kritiska pressan skal bara ikki verða kritisk ímóti honum. Men eitt skal hann vita, at tað verður ikki Høgni Hoy-dal, sum sleppur at stýra pressuni í Føroyum.



**Tað er ófrættakent, tá politikarar vilja stýra pressuni**

## Fingu eina dóttur

Mikudagin fingu føroyska Gunnvør Virgarsdóttir Dals-gaard og Oliver Bjerrehuus eina dóttur á Ríkissjúkra-húsinum í Keypmannahavn. Oliver Bjerrehuus er kent altjóða modell, sum hevur starvast fyri stór mótahús. Hann eigur frammanundan ein átta ára gamlan son, með-an hetta er fyrsta barnið hjá Gunnvør. Hetta merkir so eisini, at Susanne Bjerre-huus, sum er mamma Oliver Bjerrehuus, og Virgar T. Dals-gaard, sum er pápi Gunnvør, nú eru ávíkavist omma og abbi hjá sama barni.



*eydun@sosialurin.fo*

## Hevur tú fremmandar gestir við hús?

Hvat hava Studentaskúlin í Hoydølum, Rúsan í Havn, Útibarnagarðurin í Trongisvági, Tórshavnar Kommunuskúli og skúlin á Giljanesi í felag. Allir hesir bygningar hava verið ella eru undir álopi av blámusoppi.

Men eisini heima hjá tær og mær kunnu vit fáa blámusopp, ið sum kunnugt kann elva til heilsuvanda og ampa hjá fólki og djórum.

Tí skipar Føroya Astma/Allergifelag fyri almennum fyrilestri um blámusopp við Lone Grønborg, lívfrøðingi í Miðlahúsinum í kvøld, mána-kvøldið 12. apríl kl. 19.30.



Fyrilesturin fer at viðgera evnini:

- Hvat er blámusoppur?
- Hvussu kemur blámu-soppur inn í hús tíni?
- Hví er blámusoppur vanda-mikil?
- Hvat kann gerast at fyri-byrgja at blámusoppur kemur í hús tíni?
- Hvat kann gerast, tá blámu-soppurin er komin inn í hús tíni?
- Hvørji sjúkutekin fær ein við at búgva/liva í húsi við blámusoppi?
- Er blámusoppur vanda-mikil?

Føroya Astma/Allergi upp-lýsir, at felagið, í samráð við Innilufttænastuna, hevur givið út faldara undir heit-inum "Hvussu ávirkar blámu-soppur heilsuna?".

*rigmor@sosialurin.fo*



**Eitt gjald fyri skip og tunlar**

JÓNLEIF JOHANNESEN
KJAK Á SÍÐU 12



**Loysing gjøgnum bakdyrnar**

KAI VÁGFJALL
KJAK Á SÍÐU 12

## Hotel Bella nú í Keypmannahavn




Í sjeyti og áttatiárunum kallaðist gistingarhús í Norðdepli Hotel Bella. Johan Petersen hevði í fleiri ár gistingarhúsið í eyð-kendum gulum húsum stutt frá brúnni um Hvannasund. Johan Peteren varð kallaður Bella Johan, og hann brúkti bara kelinavnið til gistingarhúsið eisini. Fyri nøkrum árum síðani hevði Jógvan Arge fleiri sendingar við honum, sum hann kallaði "Trý korter við Bella Johan", og tá greiddi Johan eisini frá um Hotel Bella. Nú er eitt nýtt Bella Hotel á veg, og hesaferð er tað ikki í Norðdepli, men í Keypmannahavn. Talan er um størstu hotellbygging í Norðurlondum nakrantíð, og hotellið skal lata upp næsta ár.

*eydun@sosialurin.fo*

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Jaspur Langgaard
jaspur@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*